# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Mina Højgaard 95 ár



Týsdagin 15. november fylti Mina Højgaard 95 ár. Hon er ættað úr Rituvík, og har búði hon, inntil hon fyri umleið 20 árum síðani flutti inn í Heiðar at búgva. Hon býr framvegis í hugnaliga heiminum í Runavík. At hon er væl fyri og fylgir væl við var sjón fyri søgn, tá ið hon týskvøldið helt sera hugnaligan føðingardag á Sjómansheiminum í Runavík.

Foreldrini hjá Minu vóru Hanus og Nicolina Højgaard. Hon var ættað úr Kálvhúsinum á Glyvrum, og hann var sonur Per og Nicolinu, sum vóru fyrstu niðursetufólkini í Rituvík. Mina var gift við Hans Andreasi Højgaard, sum doyði í 1970. Hann var sonur Lisu og Hans Paula Højgaard, sum eisini vóru millum fyrstu niðursetufólkini í Rituvík. Tey bygdu áttanda húsið. Per og Hans Pauli vóru brøður, og tað vil við øðrum orðum siga, at verfaðir Minu, Hans Pauli, var abbabeiggi hennara.

Mina er fødd í 1910. Hon hevur upplivað báðar heimsbardagarnar, og hon minnist væl tíðina, tá ið tað var neyðugt at stríðast og strevast, og tá ið landbúnaðurin, útróðurin og sluppfiskiskapurin vóru tað, sum føroyingar dúvaðu uppá.

Mina og Hans Andreas giftust inn hjá foreldrum hansara. Tey bygdu síðani úti við Garð. Seinni bygdu tey í gerðinum, sum Hans Andreas legði inn yviri í Skákinum. Har búði Mina inntil kommunan fyri einum tjúgu árum síðani keypti húsini, tí økið skuldi nýtast til ídnað, og tá var tað, at Mina flutti heim um at búgva.

Heimið var sera hugnaligt. Lonin var fjálg, tað andaði av blíðsskapi, og Mina hevur havt eitt lætt sinni. Øll tey, sum vitjaðu og ferðaðust, kundu ikki annað enn kenna seg væl hjá Minu. Hon hevði longu tíðliga í tíðini bindimaskinu, og serliga tá ið skipsmenninir gjørdu seg til at fara avstað, var Mina nógv frammanfyri maskinuna, og tað var ikki frítt, at maðurin hjálpti henni.

Í Skákinum bar tað til hjá Minu at fylgja við rituvíkingum, tá ið teir ferðaðust heim og yviraftur, og tá ið teir fóru út av víkini og komu aftur, og tað hevur altíð kenst, at hon hevur hildið nógv av sínum bygdafólkum, sum hon og maðurin vóru so tætt knýtt at.

Mina og Hans Andreas fingu seks børn: Sigurd býr í Runavík, Nora Olsen býr í Havnini, Heri býr í Havnini, Kristian býr í Runavík, Lisa í Dali býr í Havnini, og Malan Lisberg býr niðri. Eftirkomararnir eru nógvir, og Mina er eisini olduromma.

Góða Mina! Vit vilja takka fyri so manga hungaliga løtu saman við tær og fyri væl eydnaða føðingardagshaldið týskvøldið. Hjartaliga tillukku við 95 ára føðingardegnum og framvegis blíðan byr!

N

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hilda Skarðheim**, Porkeri, andaðist mikudagin 16. november, 83 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi leygardagin kl. 17.00 í Sion í Vági. Jarðarferðin verður sunnudagin kl. 13.00. Tey ið vilja minnast Hildu kunnu lata Sion í Vági eina peningagávu.

**Elinborg Mørk Jørgensen**, ættað úr Sandvík, fer til gravar úr Hellekors kirkju á Nørrebro týsdagin 22. november klokkan 12. Tey, ið vilja minnast Elinborg, kunnu lata Sandvíkar kirkju eina gávu.

**Eyðfinn Tummasarson Jacobsen** fer til gravar úr Kirkjugarðskapellinum leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Eyðfinn kunnu lata Lágargarði eina gávu.

**Elinborg Mørk Jørgensen**, ættað úr Sandvík, andaðist í heiminum í Keypmannahavn týsdagin 15. november, 55 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Hellekors kirkju á Nørrebro týsdagin 22. november klokkan 12. Tey, ið vilja minnast Elinborg, kunnu lata Sandvíkar kirkju eina gávu.

Kistan við **Sofus Andreassen** fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Ebenezer sunnudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Sofus kunnu lata eina gávu til barnalegurnar í Grønlandi. Konto í Føroya Banka.

## Annika Hoydal 60



Annikurnar vóru fáar tá í tíðini, tá ið pápi hennara, Karsten, var bollakongur í Klaksvík og stýrdi hermetikkvirkinum har norðuri. Á húsanum á nýggju fløguni við barnasangum sæst hon ríða halakukk uppi á pápa sínum. Mamman, Marie Louise, hevur tikið myndina á Stongunum, men nýggja tøknin dugir so mangt, eisini at broyta tíð og stað.

Støðini hjá henni hava verið mong og ymisk. Hon vaks upp í Klaksvík, í býnum Manta við suðuramerikonsku Kyrrahavsstrondina, heima á Sandi, men mest í tí lítla reyða húsinum uppi á Hálsi. Har hevði pápin keypt trøðna hjá meiaristinum, tá ið tey fluttu til Havnar, so hann kundi hava seyð og neyt, sum hann hevði lært til, og vera nærri sínum barnadali og síggja ánna, hann yrkti um, og sum Annika helt hava fingið navn eftir honum ella kanska eftir abbanum Dánjali, ið var umsjónarmaður í nakrar mansaldrar á sanatoriinum í Hoydølum.

17 ára gomul fór hon burtur, og kom ongantíð heimaftur at búgva. Ella kanska er tað so, at hon ongantíð rættiliga er farin burtur, tí í næstan øllum tí, sum hon hevur fingist við, hevur heimlandið verið uppií, so ella so. Eftir lokið studensprógv í Keypmannahavn var hon við í studentakabarettum á ólavsøku og varð upp á avboð sett inn á pallin at syngja. Hetta var byrjanin til bólkin Harkaliðið, og pláturnar við kabarettsangum, sum eini tíð við fáum føroyskum útgávum hoyrdust allastaðni uttan í útvarpinum, sum ikki tordi at spæla alt, sum hon, Jógvan Telling, Kári Moutritsen og Jógvan Dahl funnu uppá at syngja.

Samstundis byrjaði sjónleikurin at taka seg upp, og í 1968 var hon við í sjónleikinum "Færinger frænder", sum Fiolteatret í Keypmannahavn spældi. Ein friðarligur hampaleikur eftir nútíðar máti, men kortini so mikið øðrvísi tá, at tey sluppu ikki at framføra hann allastaðni, tá ið tey komu til Føroyar at ferðast við honum.

Stjórin á Fiolteatret, Arne Skovhus, ráddi henni til at søkja inn á Statens Teaterskole, sum beint tá varð stovnaður. Hon stóð royndina og var á fyrsta sjónleikaraliðnum, sum fekk prógv haðani.

Hon hevur verið við í framførslum, filmum og sjónleikum niðri og gjørdist eitt kent navn í Danmark. Ikki so ofta hevoyum, men í 1976 hevði hon høvuðsleiklutin sum Annika í Dímun í leikinum hjá Jens Paula Heinesen, sum varð framførdur í sjónleikarhúsinum í Havn.

Meira og meira var tað kortini sangurin, sum hon legði seg eftir, og samstarvið við Ian McCalman og hansara kenda skotska bólk fekk stóra og góða móttøku og førdi millum annað til barnaplátuna, sum kom út í 1975 og er vorðin ein føroyskur klassikari. Við nýggju barnafløguni, sum kemur út á føðingardegnum, eru komnar 14 plátur, bond og fløgur. Sum tíðin er liðin hevur hon gjørt meira við at gera tónleik sjálv og seta løg til føroyskar upprunayrkingar. Egnar útgávur eru komnar við tekstum eftir Róa Patursson, Gunnar Hoydal og William Heinesen.

Annika hevur ferðast víða um lond og framført í øllum Norðurlondum. Hon setir sær sjálvari stór krøv og er neyðsemjusør. Hon vil, at tað skal vera í lagi, sum hon ger, og hon hevur øll árini lagt dent á at kunna velja sjálv og ikki lata sær alt lynda. Av tí sama hevur hon ongantíð bundið seg fast til ávís sjónleikarhús ella sjónleikarfeløg, sjálvt um tað hevur staðið henni í boði.

Íbúðin hjá henni og manninum Klavs Lockwood í Admiralgade mitt í Keypmannahavn er blivin ein miðstøð hjá vinum, landsmonnum og familju. Men altíð leitar hon aftur á klettarnar, og føðingardagin vildi hon vera her og onga aðra staðni.

Hevði tað borið til, skuldi tað havt verið í tí reyða húsinum uppi á Hálsi. Men tað stendur nú forfjónað undir bingjum og óruddi og stórum handilsbygningum. Hon minnist aftur á tær grønu fløturnar, og viðhvørt hevur hon hug at finnast at teimum, sum fingu hetta í lag.

Árini eru liðin. Nógv er hent, nógv er broytt, og nú eru Annikurnar nógvar. Men bara ein er sum hon.

gh

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu tá kæri bróður, mammu- og ommubeiggi okkara

**Poul Hammer**
úr Hovi

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, kransar og heilsanir
Takk til starvsfólkið á B6 á Landssjúkrahúsinum, fyri ta tíðina tit vóru um Poul.
Takk øll tit, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og við ervi.
Takk til prest, berarar, organist, sangarar og gravarar.
Takk til tykkum, ið góvu Missiónshúsinum í Hovi gávu.
Hjartaliga takk øll somul.

*Familjunnar vegna*

**Elias og Adina**

## Jarðarferð

Kistan við

**Sofus Andreasen**

fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin 19. november kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer sunnudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Jan, Svend Arni og Anna Maria**

Tey, ið vilja minnast Sofus, kunnu lata eina gávu til Barnalegurnar í Grønlandi, konta í Føroya Banka.